# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 11**<br>**Tíð:** 15. desember 2014, kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Petry Joensen | |
| **Fastir fundardagar:**<br>28. januar, 17. februar, 17. mars, 28. apríl, 26. mai, 23. juni, 25. august fl. 8. september, 29. september, 27. oktober, 24. november, 15. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir uttan Tórður Poulsen | **Ikki á fundi:**<br>Tórður Poulsen, fráboðað |

**1) Mál nr.: 14/00182 Søla av ogn matr. nr. 475b**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Teknisku nevnd, sum á fundi 1. desember hevur samtykt at selja matr. nr. 475b sum er 130 $m^2$ til víddar til Finnboga S. Olsen fyri dagsprís.

Sambært kunngerð nr. 122 um alment útboð av kommunalari fastogn er ásett í §2 stk. 3 at: Fastogn nýtist ikki at verða boðin alment út, um talan er um sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m2 til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á.

Á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni er dagsprísur kr. 69,00 pluss vetrarbit (kr. 4,80)

Fíggjarnevndin samtykti á fundi 8. desember einmælt, at taka undir við Teknisku nevnd. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at selja stykkið.

**2) Mál nr.: 14/00233 Eykajáttan til Suðuroyar Barnaverndartænastu 2014, seinna viðgerð**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini sum á fundi 17. november viðgjørdi tilmæli frá Sosialu nevnd um at játta eina eykajáttan til Suðuroyar Barnaverndartænastur fyri restina av 2014 uppá 400 tús. kr..

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Sosialu nevnd, og beina málið í býráðið.

Undirskriva:

Til fyrru viðgerð á býráðsfundi 24. november var einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð.

**3) Mál nr.: 14/00259 Skattafrælsi til Johannu TG 326**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til staðfestingar, skattafrælsi til Johannu TG 326. Vágs Býráð hevur umvegis teldupost samtykt at viðmæla TAKS-ráðnum at geva Johannu TG 326 skattafrælsi. Avgerðin skal staðfestast á býráðsfundi.

**Avgerð:**
Samtyktin staðfest av Vágs Býráð .

**4) Mál nr.: 14/00270 Fundardagar 2015**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til nevndar- og býráðsfundir í 2015. Býráðsfundirnir eri ásettur at verða 26/1, 23/2, 30/3, 27/4, 1/6, 29/6, 24/8, 28/9, 26/10, 30/11 og 14/12 á kommunuskrivstovuni kl. 19.00.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva: